# Grindadráp í Føroyum 1940—1962.

(Pilot Whales (Globicephalus melaena Traill) killed in Faroe 1940—1962.)

*Eftir Jákup Sv. Joensen.*

Hvussu langt aftur í tíðina menn hava dripið grind í Føroyum, man vera ilt at siga við vissu. Aftur til 1584 hava vit upplýsingar um grindir í Føroyum. LOUIS ZACHARIASEN (1959) vil vera við, at grind er dripin her langt aftur í miðøldina, men H. C. MÜLLER (1884) heldur, at grind er kend og dripin her á landi aftur í fornøldina.

H. C. MÜLLER (1884), ið var sýslumaður í Streymoyar sýslu frá 1839, hevur skrivað um grindir í Føroyum upp gjøgnum tíðirnar. Í 1584 doyðu 4 stórir grindahvalir (nýðingar) undir Lítlu Dímun. Teir rendu seg á land. Annars var fyrsta grindin, vit vita um, dripin Norðri í Sundinum í september 1600. Hetta var lítil grind (24 hvalir). Frá tíðarskeiðnum 1641—1708 (Gabels tíðin) hava vit at siga ongar upplýsingar um grindir. Árini 1745—1795 vóru vánalig grindaár. Í hesum 50 árunum doyðu bert 70 hvalir árliga í meðal. Tey nógvu árini kom tá eingin grind, í 1755—1775 bert ein lítil (16 hvalir í des. 1770). Frá 1796 til 1883 er grind deyð á hvørjum ári, serstakliga frá 1830 vóru góð grindaár.

Um grindir í árunum 1884—1903 er einki komið upp á prent, men mesta av tilfarinum eigur at vera til skjals, og eru vit farnir undir at savna tað saman. Um árini 1904—1939 hevur DEGERBØL (1940) skrivað. Í teimum báðum

árunum 1924 og 1927 doyði eingin grind, og í 1929 doyðu bert 17 hvalir, so hetta vóru vánalig grindaár. 1931—39 vóru góð ár, best var 1939, tá 13 grindir komu — tilsamans 2716 hvalir. Í 1931 doyðu 8 grindir (2376 hvalir) og í 1938 12 grindir (2072 hvalir).

Mesta av tilfarinum um grindir í 1940—62 hava vit fingið beinleiðis frá sýslumonnunum, og skulu vit her nýta høvi til at takka teimum hjartaliga. Nakað hava vit eisini fingið frá landsskjalasavninum saman við eldri tilfari, sum vit eru landsskjalavørðinum sera takksamir fyri.

1. talva vísir hvussu nógvar grindir og hvussu nógvir hvalir eru deyðir í árunum 1940—62 hvørt ár og hvønn mánað sær. Hesi 23 árini eru deyðar 251 grindir í Føroyum, tilsamans 39.573 hvalir. Í meðal verður hetta 11 grindir og 1720 hvalir upp á árið. Í árunum 1584—1883 (Gabels tíðin undantikin) doyðu í meðal 506 hvalir um árið. Og í 1904—1939 doyðu 740 hvalir upp á árið. Tey seinastu 23 árini hava sostatt verið stak góð grindaár, so góð sum ongantíð áður. Best var 1941. Tá doyðu 21 grindir ella 4214 hvalir. Hetta árið er samstundis besta grindaár, vit vita um at hava verið nakrantíð í Føroyum. Næst kemur 1843, tá vórðu 18 grindir við 3143 hvalum dripnar.

1. mynd vísir hvussu stórur partur (í %) av grindahvalunum, ið deytt er í teimum ymisku mánaðunum í tíðarskeiðinum 1584—1883 og 1940—62. Sum heild síggja vit, at grindirnar eru komnar fyrr á árinum í okkara tíð enn í gomlum døgum. Nú er juli mánaður vorðin besti grindamánaður, fyrr var tað august. Men enn sum áður er tað á sumri og út á heystið, ið er besta árstíðin til grindir. Heldur meira av grind er komið á hávetri nú enn fyrr, serstakliga í desember, januar og februar. Mars hevur verið slakasti grindamánaður í 1940—62. Bert tvær grindir eru dripnar í hesum mánaði, og báðar komu tær í 1940 — sama dag, 2. mars — onnur á Sandvík, hin á Hvalba. Tær vórðu skiftar saman.

Grindirnar hava allar tíðir verið ógvuliga ymiskar til

støddar. Soleiðis hevur eisini verið í seinnu árum. Nakrar hava bert verið fáir hvalir, einstakar bert 1 hvalur, men man tað tá vera so, at grindin er sloppin út aftur, bara ein ella einstakir hvalir hava ligið eftir. Størsta grindin, ið komin er hesi seinastu 23 árini, man vera hon, ið doyði Heima á Sandi 6. oktober 1940. Tíverri er tað líkt til, at einki skjal er at finna um hesa grind. Men eftir upplýsingum úr dagbløðum og frá sýslumanninum fyri Sandoyar sýslu vórðu merktir o. u. 800 hvalir. Tó halda sandingar, at grindin var nærri 1200 hvalum. Menn komu ikki út yvir at draga upp, og hann brast á við illveðri. Annars skal størsta grindaskiftið hava verið í Miðvági og Sandavági 8. august 1899. Henda dag vórðu 1100 hvalir dripnir í Miðvági (1050 merktir). Tá sløddust 170 eftir. Teir vóru komnir út um blóðið og fingust ikki inn í tað aftur. So vórðu teir riknir inn á Sandavág og dripnir har. Alt varð skift undir einum — tilsamans 1220 hvalir (Mikkjal Dánjalsson Á Ryggi 1935).

2. talva vísir hvussu nógvar grindir, ið dripnar eru og hvalir á teimum ymisku hvalvágunum í árunum 1940—62. Besta grindaplass í hesum árum hevur verið Klaksvík. Har eru 37 grindir deyðar — tilsamans 5488 hvalir. Næst kemur Vágur, har 27 grindir (4624 hvalir) hava lagt beinini. Á Miðvági eru deyðar 21 grindir — 4040 hvalir, í Tórshavn 25 grindir — 3255 hvalir og á Hvalba 20 grindir við 3469 hvalum. Annars er grind deyð í 22 plássum í Føroyum í hesum tíðarskeiði. Men í summum plássum er lítið deytt. Á Viðvík er soleiðis bert ein grind dripin í hesum árum, og var tað í 1942. Hon er her sett til 125 hvalir. Menn mettu hana til 100—150 hvalir. Tað vildi so illa til, at illveður brast á við brimi, so flestu hvalirnir skolaðu út aftur, áðrenn teir vóru merktir. Á Skálavík er eisini bara 1 grind dripin — 16 hvalir í 1956.

Um hvussu skjótt grindahvalurin veksur á okkara leiðum, er lítið kannað. Høst (1875) skrivar, at størsti grindahvalur, hann hevur sæð, var 23 skinn ella 24 føtur í fullari longd

1. talva. Tal á grindum og grindahvalum, deyðir 1940–62.

*Number of schools and specimens of pilot whales, killed in 1940–62.*

| | Jan. | Febr. | Mars | Apríl | Mai | Juni | Juli | Aug. | Sept. | Okt. | Nov. | Des. | Total |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1940 | 1 187 | — | 2 210 | — | — | — | 2 383 | 1 437 | — | 2 955 | — | — | 8 2.172 |
| 41 | 3 393 | 1 170 | — | — | — | — | 4 720 | 6 1217 | 3 759 | 2 728 | 2 227 | — | 21 4.214 |
| 42 | — | 1 57 | — | — | — | — | 4 1059 | 2 284 | 1 516 | — | — | 1 7 | 9 1.923 |
| 43 | 1 121 | 2 267 | — | — | — | 1 184 | 1 131 | 3 296 | — | — | — | — | 8 999 |
| 44 | 1 55 | — | — | — | — | 1 231 | 5 844 | 1 95 | 2 135 | — | — | — | 10 1.360 |
| 1945 | — | — | — | — | 1 144 | 1 327 | 2 70 | 2 514 | 1 93 | — | — | 3 407 | 10 1.555 |
| 46 | — | — | — | — | 1 107 | 1 65 | — | 2 431 | — | 1 429 | — | — | 5 1.032 |
| 47 | — | — | — | 1 272 | — | — | 3 1073 | 2 231 | — | 1 165 | — | 2 197 | 9 1.938 |
| 48 | — | — | — | — | — | 1 377 | 2 168 | 1 42 | — | — | — | — | 4 587 |
| 49 | — | — | — | — | 1 237 | 2 386 | 3 137 | 1 66 | 1 24 | 2 105 | — | — | 10 955 |
| 1950 | — | — | — | — | 1 140 | — | 2 149 | 1 97 | 2 89 | — | — | — | 6 475 |
| 51 | — | — | — | — | 1 410 | 2 250 | 5 1396 | 2 129 | 1 254 | — | 1 368 | 1 28 | 13 2.835 |
| 52 | — | — | — | — | — | 2 119 | 1 123 | 3 584 | 1 323 | 1 88 | 1 16 | — | 9 1.253 |
| 53 | — | 1 101 | — | 1 182 | 3 405 | 5 687 | 2 342 | 1 123 | — | — | — | 1 259 | 14 2.099 |
| 54 | — | 1 1 | — | — | 1 198 | 3 620 | — | 6 1172 | 1 42 | — | — | — | 12 2.033 |
| 1955 | — | — | — | — | 2 217 | — | 1 119 | 1 385 | — | — | 1 155 | — | 5 876 |
| 56 | — | 1 248 | — | 1 72 | 1 92 | 1 129 | 4 718 | 1 5 | 2 417 | 1 112 | — | 1 16 | 13 1.809 |
| 57 | — | — | — | — | 3 262 | 2 205 | 4 451 | 3 747 | 2 169 | — | — | 1 245 | 15 2.079 |
| 58 | — | — | — | — | 2 307 | 2 307 | 3 474 | 2 231 | 3 657 | — | 1 43 | 1 600 | 14 2.619 |
| 59 | 1 129 | — | — | — | 1 123 | 3 353 | 3 387 | 2 434 | — | — | — | — | 10 1.426 |
| 1960 | — | — | — | 1 90 | — | 3 367 | 7 710 | 3 306 | 1 207 | — | — | — | 15 1.680 |
| 61 | — | — | — | — | 2 59 | 3 505 | 4 533 | 2 157 | 4 270 | 1 112 | — | 2 256 | 18 1.892 |
| 62 | — | — | — | — | 1 244 | 1 149 | 4 460 | 2 371 | 1 228 | 1 36 | 1 122 | 2 152 | 13 1.762 |
| 1940-62 | 7 885 | 7 844 | 2 210 | 4 616 | 21 2945 | 34 5261 | 66 10447 | 50 8354 | 26 4183 | 12 2730 | 7 931 | 15 2167 | 251 39.573 |




1. mynd. Lutvís deytt av grindahvali í ársins mánaðum í 1584–1883 og í 1940–1962.

*The distribution of pilot whales killed in the different months in 1584–1883 and in 1940–1962.*

(11 føtur úr eyga í got). Tað er bara hannhvalurin, ið verður so stórur, honhvalurin verður ikki størri enn 12–16 føtur (Høst 1875). H. C. Müller (1884) hevur kannað hvalastødd og -slag í 8 grindum við tilsamans 1624 hvalum. Av hesum vóru 545 hannhvalir (♂♂) og 1079 honhvalir (♀♀) Størsti ♂ var 10 føtur 4 tm, og størsti ♀ var 8 føtur 10 1/2 tm máldur úr eyga í got.

Í 1962 vórðu hvalir kannaðir í tveimum grindum. Onnur doyði í Tórshavn 5. juli, og hin í Streymnesi 1. august.




2. mynd. Longd á grindahvali (hann- og hon hvalir) í 20 cm flokkum.
*The length distribution of pilot whales (male and female) in 20 cm groups.*

Í fyrru grindini doyðu 76 hvalir (merktir vóru 75 – og mettir til 19 gyllin 12 1/2 skinn). Máldir vórðu 74 hvalir. Í seinnu grindini doyðu 249 hvalir (237 merktir – mettir til 54 gyllin 19 1/2 skinn). Máldir vórðu 116 hvalir. Úrslitið av málingunum í báðum grindum sæst á 3. talvu og 2. mynd. Hvalirnir eru máldir úr trantinum í skarið á aftara jaðara á sveivini. Á talvuni sæst talið á hvalum í 10 cm-flokkum, hvør grindin sær og hvørt slagið fyri seg. Myndin vísir longdina í 20 cm-flokkum í báðum grindum saman, men ♀ og ♂ hvørt sær. Sum kunnugt verður hannhvalurin munandi størri enn honhvalurin, og sæst hetta eisini bæði á talvuni og myndini. Størsti máldi ♂ var 615 cm, og var

2. talva. Grindir og grindahvali

*Number of schools and specimens of pi*

| | Hvannasund | Viðvík | Klaksvík | Funningsfj. | Fuglafj. | Gøta | Norðskáli | N. í Sundum | Kollafj. | Tórshavn | Vestmanna |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1940 | 1 155 | | | | | | | | | | |
| 41 | 1 474 | | 3 713 | 2 132 | | | | 2 335 | | 1 155 | 1 462 |
| 42 | | 1 125 | | | | 1 57 | | | | | 2 334 |
| 43 | 1 94 | | 1 184 | | | | | | | 1 121 | |
| 44 | 1 231 | | 5 783 | | | 1 34 | | | | 1 67 | |
| 1945 | 2 10 | | | 1 327 | | | | | 1 46 | 2 159 | 1 355 |
| 46 | | | 1 65 | | | | 1 107 | | | | |
| 47 | | | 1 76 | | | 1 386 | | | | 2 513 | 1 41 |
| 48 | | | 2 441 | | | | | 1 42 | | 1 104 | |
| 49 | 1 20 | | 2 67 | | | | 1 89 | 1 12 | | 2 319 | |
| 1950 | 1 19 | | | | 1 140 | | | 1 130 | | | |
| 51 | 1 256 | | | | | 1 500 | 2 189 | 1 451 | 1 28 | | 1 368 |
| 52 | 2 116 | | 2 158 | | | 1 16 | 1 88 | | | | |
| 53 | 1 259 | | 2 148 | | 1 99 | 2 464 | 1 143 | 1 50 | | 3 334 | |
| 54 | | | 1 42 | 1 126 | 1 1 | | | | | 1 156 | |
| 1955 | | | 1 385 | | | | | 1 155 | | | |
| 56 | | | | | | 1 248 | 1 129 | | | 1 205 | |
| 57 | | | 2 499 | | | 2 179 | | | | 3 413 | |
| 58 | | | 3 586 | | 1 51 | | 1 355 | | | 2 236 | 3 853 |
| 59 | | | 2 285 | | | | | 2 249 | | | 2 177 |
| 1960 | 1 24 | | 4 512 | | | | | | | 2 171 | 1 94 |
| 61 | | | 3 358 | 2 2 | | | | 3 545 | | 1 115 | 2 137 |
| 62 | | | 2 186 | | | 1 64 | 1 36 | 2 337 | | 2 187 | |
| Grindir *schools* | 13 | 1 | 37 | 6 | 4 | 11 | 9 | 15 | 2 | 25 | 14 |
| Hvalir *specimens* | 1658 | 125 | 5488 | 587 | 291 | 1948 | 1136 | 2306 | 74 | 3255 | 2821 |

á teimum ymisku hvalvágunum.

*pilot whales — and where they are caught.*

| Miðvágur | Sørvágur | Tindhólmur | Sandur | Húsavík | Skálavík | Hvalbøur | Sandvík | Tvøroyri | Vágur | Fámjin | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 437 | | 1 225 | 1 800 | | | 2 292 | 1 105 | 1 158 | | | 1940 |
| 1 83 | | | | 1 250 | | 1 321 | 1 266 | 2 145 | 4 736 | 1 142 | 41 |
| 1 516 | | | | 1 200 | | 1 265 | | 1 419 | 1 7 | | 42 |
| | 1 118 | 1 131 | | | | 1 158 | | | 1 109 | 1 84 | 43 |
| 1 95 | | | | 1 150 | | | | | | | 44 |
| | | 1 162 | | 1 352 | | | | | 1 144 | | 1945 |
| | | | | | | 1 429 | | | 2 431 | | 46 |
| | | | | | | 1 121 | | 1 446 | | 2 355 | 47 |
| | | | | | | | | | | | 48 |
| 1 85 | | | | | | 1 66 | | | 1 297 | | 49 |
| | | | | 1 22 | | 1 97 | | | 1 67 | | 1950 |
| 1 88 | | | | | | 4 836 | | | 1 119 | | 51 |
| 2 552 | | | | | | | | | | 1 323 | 52 |
| | | | | | | 1 182 | | | 1 257 | 1 163 | 53 |
| 2 523 | | | | 1 135 | | 2 300 | | | 1 187 | 2 563 | 54 |
| 1 119 | | | | | | | | | 2 217 | | 1955 |
| 3 488 | | | 1 112 | 1 5 | 1 16 | | | | 4 606 | | 56 |
| 2 416 | | | 1 93 | | | 2 123 | | 1 80 | 1 157 | 1 119 | 57 |
| | 1 89 | | | 1 115 | | 1 116 | | | | 1 218 | 58 |
| 1 104 | | | | | | | | | 3 611 | | 59 |
| 1 74 | | | 1 2 | 2 162 | | 1 163 | | 1 271 | 1 207 | | 1960 |
| 2 251 | | 1 58 | | 1 95 | | | | 3 331 | | | 61 |
| 1 209 | | 1 122 | | 1 149 | | | | | 2 472 | | 62 |
| 21 | 2 | 5 | 4 | 12 | 1 | 20 | 2 | 10 | 27 | 10 | *Grindir schools* |
| 4040 | 207 | 698 | 1007 | 1635 | 16 | 3469 | 371 | 1850 | 4624 | 1967 | Hvalir *specimens* |

3. talva. Longd á grindahvali.
*Length measurements of pilot whales.*

| | 5. juli 1962 | | | 1. august 1962 | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Cm | ♀♀ | ♂♂ | Total | ♀♀ | ♂♂ | Total |
| 180–189 | | | | 1 | | 1 |
| 190 | | 1 | 1 | | | |
| 200 | | | | | 1 | 1 |
| 210 | | | | 1 | 3 | 4 |
| 220 | 1 | 1 | 2 | 1 | | 1 |
| 230 | | | | | | |
| 240 | | 2 | 2 | | 1 | 1 |
| 250 | | 1 | 1 | 1 | | 1 |
| 260 | | 1 | 1 | 1 | 2 | 3 |
| 270 | 4 | | 4 | | 1 | 1 |
| 280 | | 1 | 1 | 2 | 1 | 3 |
| 290 | | | | | 1 | 1 |
| 300 | 2 | 1 | 3 | 1 | 1 | 2 |
| 310 | 2 | | 2 | 1 | 3 | 4 |
| 320 | | 1 | 1 | 3 | 2 | 5 |
| 330 | 1 | 1 | 2 | 1 | | 1 |
| 340 | | | | 1 | 1 | 2 |
| 350 | 1 | 1 | 2 | 4 | | 4 |
| 360 | 1 | | 1 | 1 | 1 | 2 |
| 370 | | 1 | 1 | 1 | | 1 |
| 380 | | 3 | 3 | 3 | 3 | 6 |
| 390 | 1 | | 1 | 4 | 2 | 6 |
| 400 | 1 | 1 | 2 | 2 | 1 | 3 |
| 410 | 2 | 1 | 3 | 2 | | 2 |
| 420 | 3 | 2 | 5 | 9 | 2 | 11 |
| 430 | 1 | 1 | 2 | 9 | | 9 |
| 440 | 4 | | 4 | 8 | 2 | 10 |
| 450 | 5 | 1 | 6 | 5 | 1 | 6 |
| 460 | 3 | 1 | 4 | 4 | 1 | 5 |
| 470 | 3 | | 3 | 5 | 2 | 7 |
| 480 | 2 | 1 | 3 | 2 | 1 | 3 |
| 490 | 3 | 1 | 4 | 1 | | 1 |
| 500 | | 1 | 1 | | | |
| 510 | | | | | | |
| 520 | | | | | | |
| 530 | | 1 | 1 | | 1 | 1 |
| 540 | | | | | 1 | 1 |
| 550 | | | | | | |
| 560 | | | | | 2 | 2 |
| 570 | | 1 | 1 | | 3 | 3 |
| 580 | | 1 | 1 | | 1 | 1 |
| 590 | | 2 | 2 | | 1 | 1 |
| 600 | | 3 | 3 | | | |
| 610–619 | | 1 | 1 | | | |
| Total | 40 | 34 | 74 | 74 | 42 | 116 |

hann mettur til 12 skinn. Størsti máldi honhvalurin var 495 cm, mettur til 8 skinn. Minsti leiftur var 185 cm. Kann vera, at hann er lagdur í drápinum. Annars vórðu máldir 8 ófødningar í hesum báðum grindum. Teir vóru allir fullbornir. Teir minstu vóru ljósagráir á liti, teir størru myrkari, men tó væl ljósari enn vaksnu hvalirnir. Til longdar vóru ófødningarnir 150, 155, 160, 160, 160, 165, 170 og 175 cm. Ófødningurin, ið var 165 cm langur, varð tikin úr hvali, ið var 390 cm. Í trimum øðrum førum bar til at máta mammuna, og var hon 400—450 cm.

Brown (1961) og Sergeant and Fisher (1957) skriva, at hvølparnir hjá grindahvalinum (Globicephalus melaena) eru 6—7 feet (183—213 cm), tá teir verða lagdir. Í New Foundlandi, har teir í seinnu árum hava dripið nógva grind, hava menn kannað vøksturin á hvalunum av tonnunum. Teir hava funnið, at ♀ og ♂ vaksa líka skjótt til tey eru kynsbúgvin. Á 6 ára aldri eru bæði sløgini um 12 føtur (365 cm), men tá er ♀ kynsbúgvin og veksur tí nú spakuligari enn ♂. Ikki fyrr enn hann er um 12 ár, verður ♂ kynsbúgvin. 20 ára gamlir eru ♂♂ um 18 føtur (550 cm) og ♀♀ 15 føtur (457 cm) í meðal (Norsk Hvalfangst-Tidende 1955, nr. 11, bls. 683). Hesar kanningar eru sum sagt gjørdar í New Foundlandi, og um vakstrarlagið á grindahvalinum har er tað sama sum hjá okkum, er ilt at siga. Teir høvdu í 1955 mált tilsamans 3000 hvalir, og størsti av teimum var 20 føtur (610 cm). Høst (1875) skrivar sum sagt, at hann hevur mált hval uppá 24 føtur (23 skinn), og gyllinsfiskurin er ikki óvanligur á okkara døgum, so tað er líkt til, at grindahvalurin verður heldur størri á okkara leiðum enn vestanfyri Atlantshav.

## SUMMARY

H. C. Müller (1884) gives the figures for the yearly catches of pilot whales (Globicephalus malaena Traill) in the years 1584–1883. For the years 1884–1903 no figures are published, but for the catches in 1904–1939 we can find the figures by Degerbøl (1940).

The present paper gives the monthly and yearly catches of pilot whales in the Faroes for the years 1940–1962. (Table 1). In these 23 years we had the very best catches, we ever had before. In Table 2 is seen in which bays the scools are killed (hvalvágur). In 1962 were measured 190 whales. Table 3 and Fig. 2 show the results of the measurements. 8 fetus were measured, the lengths was 150–175 cm.


## BÓKMENTIR


1. *Brown, S. G.:* Observations of Pilot Whales (Globicephala) in the North Atlantic Ocean. Norsk Hvalfangst-Tidende *1961*, nr. 6, bls. 225–254.
2. *Degerbøl, Magnus*: Mammalia. The Zoology of the Faroes, Vol. 3, part 2. København *1940.*
3. *Høst, H. E.*: Om Hvalfangsten på Færøerne. Nordisk Tidsskrift for Fiskeri, II, bls. 313–352. København *1875.*
4. *Müller, H. C.:* Oplysninger om Grindefangsten på Færøerne. Vidensk. Medd. Dansk Naturh. Foren. f. 1883, bls. 17–47. København *1884.*
5. *Ryggi, Mikkjal D. á*: Dýralæra I, bls. 110–117. Tórshavn *1935.*
6. *Sergeant, David E.*: Whaling in New Foundland and Labrador Waters. Norsk Hvalfangst-Tidende *1953*, nr. 12, bls. 687–695.
7. *Sergeant, D. E.* and *Fisher, H. D.*: The smaller cetacea of eastern Canadian waters. J. Fisk. Res. Bd. Can. 14,83, *1957.*
8. *Zachariasen, Louis*: Føroyar sum rættarsamfelag 1535–1655, 1. partur, bls. 88. Fróðskaparrit. Supplementum 4. *1959.*